## United-leikari úti í ein mánaða

Serbiski verjuskansin hjá Manchester United, Nemamja Vidic, má sita sum áskoðari við skaða komandi mánaðin. Vidic lendi so óheppið eftir ein nærdyst, tá ið hann og liðfelagar hansara leygardagin vunnu 4-1 á Blackburn. Tað var fyrst líkt til, at hann hevði brotið óstbeinið, ið hevði kostað honum kappingarárið, men so var ikki. Felagið boðar nú frá, at hann verður ikki tøkur komandi mánaðin.

## Kahn gevst í 2008

Týskistjørnumálverjin, Oliver Kahn, almannakunnger nú, at hann gevst at leika fótbólt komandi summar. 37 ára gamli Bayern München-málverjin heldur tað vera best, at hann gevst á toppinum. Júst somu meining hevði hann, tá ið hann eftir HM í fjør gavst á týska landsliðnum. Hann hevur trúðfast altíð leikt fyri týska stórfelagið, og teir eru eisini sinnaðir at bjóða Kahn nýggjan sáttmála, sum hann tó sigur nei takk til. Hansara seinasti arbeiðsdagur verður tískil 30. juni 2008.






*Tað eydnaðist at skjóta 12 mál í fyrsta umfarinum av Formuladeildini. Í Gøtu komu tvey mál, tá ið EB/Streymur vann á GÍ*

# Tað er einki nýtt undir sólini

**Hóast tað í flestu førum tók sína tíð, so var bara talan um favorittsigrar, tá ið fyrsta umfarið í Formula deildini var á skránni**

FORMULADEILDIN
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Eftir at liðini í tríggjar mánaðir hava fyrireikað seg, so varð sunnudagin farið undir 2007 landskappingina. Mál vórðu skorað í øllum fimm dystunum, og í øllum førunum varð ein vinnari funnin. Allir dystirnir endaðu við sigri til liðini, sum vórðu roknað at vera favorittar.

Fótbóltslíkindini vóru ikki so galin, tá ið hugsað verður um árstíðina, og fótbóltsspælið var í flestu førum soleiðis, sum tað kann roknast við, at tað er í fyrsta umfarinum í landskappingini.

Meistararnir í HB hava ikki tapt síðani eina ferð tíðliga síðsta summar. HB legði sera bragdliga fyri á Skála. Fyritreytirnar hjá meistarunum vóru einki serligar sammett við mótstøðuliðið. Fleiri av lyklaspælarunum vóru á møðsamari landsliðsferð í Georgia. Hetta vóru teir sjálvandi móðir av, og tá ið lyklaspælarar vóru í Georgia bar tað ikki til í HB at fyrireika seg til ferðina inn á Skála so væl, sum tað annars hevði verið ynskiligt.

Tí lúrdi møguleikin fyri, at Skála kundi fáa eitt stig ella kanska syrgja fyri, at havnarmenninir einki fingu við sær til hús. Soleiðis tørnaði tað als ikki út. HB smurdi Skála av.

Gongdin og úrslitið sigur, at HB er framúr væl fyri, og tað setur samstundis spurnartekin við, hvussu væl Skála er fyri.

Tríggir sigrar vórðu vunnir á útivølli.

NSÍ, sum so ógvuliga fegið vil vera við í stríðnum um toppplaseringarnar, fekk fult á Sandi. Tað tók sína tíð hjá NSÍ at fáa sigursmálið. At tað í síðstu løtu eydnaðist ber boð um, at marginalirnir vóru við, og at B71 misti á stokkinum ber boð um, at uppflytararnir ofta hava tað torført.

### Ábendingar í Gøtu

Ársins lið størsta partin av kappingini í fjør, EB/Streymur, var í stórum stríði í Gøtu. Tað eydnaðist felagsliðnum at sleppa til hús aftur við øllum. Marginalirnir vóru á teirra síðu, og tað kann væl vera, at hetta var fyrsta staðfestingin av, at felagsliðið aftur í ár fer at kappast í toppinum, meðan GÍ fer at kenna stríðið torførari enn so.

Skírisdag skulu Skála, B71 og GÍ spæla á útivølli. Í førunum hjá Skála og B71 verður talan um ógvuliga torførar uppgávur. Skála skal til Streymnesar, og B71 skal í Gundadal at spæla ímóti HB. Gongdin og úrslitini í hesum báðum dystunum fer at vísa, um eitt nú Skála og B71 beinanvegin so at siga fara at koma undir trýst.

Á pappírinum tykist uppgávan hjá GÍ lættari. Gøtumenn skulu fyri fyrstu ferð spæla landskappingardyst á Argjum.

Heimasigrunum í fyrsta umfari stóðu B36 og VB/Sumba fyri. KÍ og AB fóru til hús aftur sum av torvheiðum. Í báðum førum var talan um 1-0 heimasigrar. B36 skal Skírisdag spæla í Runavík, meðan VB/Sumba skal til Klaksvíkar.

Klaksvíkingar kunnu ivaleyst liva við, at teir taptu 1-0 í Gundadali ímóti B36. Í fjør vóru teir tvær ferðir í høvuðsstaðnum og spældu ímóti B36, og tá fingu teir báðu ferðirnar góða úrtøku. Fyrru ferðina endaði tað 1-1, og seinnu ferðina vunnu teir 5-1. 1-0 tapið hesa ferð er neyvan nøkur skandala. Hon fer av álvara at spøkja, um KÍ Skírisdag ikki fer at megna at fáa fult, tá ið teir fara at fáa vitjan av VB/Sumba. Men úrslitini hjá KÍ á heimavølli í fjør bera ikki boð um, at klaksvíkingar duga serliga væl at gagnnýta heimaskansan, um talan yvirhøvur er longur um nakran skansa.

Tólv mál í fimm dystum er ikki heilt av leið, men tað hevði havt verið soltið, um HB og Skála ikki høvdu havt skorað tilsaman sjey mál.

## KÍ og NSÍ best frá byrjan

**1. deild hjá kvinnum byrjaði eisini um vikuskiftið, har tveir dystir vóru á skránni. KÍ vann á GÍ, meðan NSÍ koppaði EB / Streymur**

FÓTBÓLTUR
*Pætur Albinus*
*patur@sosialurin.fo*

So var kvinnukappingin aftur í gongd. KÍ-kvinnurnar eru aftur í ár stórfavorittar, men liðini tykjast at gerast tættari og tættari. Um vikuskiftið vórðu tveir dystir leiktir.

### KÍ tók um endan

Kvinnurnar hjá KÍ tóku í endan, har teir sleptu honum í fjør. Longu í fyrstu umfari góvu tær okkum greiðar ábendingar um, at tær aftur í ár ætla at standa á ovastu rók. Tær vunnu ein tryggan 4-0 sigur á GÍ heima í Klaksvík. Hálvleiksstøðan var 2-0.

Tað var ikki ein væl leiktur dystur, og tað sást á liðunum, at tað var tíðliga á fótbóltsárinum. Alt ov nógvir bóltar vórðu sparkaðir upp í luftina, og lítið skipað spæl fanst. Sigrid Jacobsen stóð fyri tveimum av málunum, meðan Malena Josephsen og Elsa Maria Simonsen skutu hvør sítt mál.

### NSÍ væl frá byrjan

NSÍ, sum var tætt við at rokka endaumfarinum í fjør, sær út til at vilja tað øðrvísi í ár. Kvinnurnar úr Runavík vunnu ein tryggan sigur í gjár, tá ið tær fingu vitjan av felagsliðnum við Streymin. NSÍ gjørdi bart, og vann dystin 3-1. Tær gulu og svørtu kundu eisini fara nøgdar til hálvleiks við einari 2-0 leiðslu.